# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Styrkisroynd á Hálsi

**Sunnudagin kunnu Neistamenn gera sær eina hóming av, hvat skal til hjá teimum í eini møguligari FM-finalu móti StÍF**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Nú steypakappingin er løgd aftur um bak, verður bíðað eftir FM-finalunum í hondbólti. Tvær finalur, har tað longu nú tykist mest sum greitt, hvørji liðini eru. Tó at onnur eisini kunnu blanda seg.

## Styrkisroynd

Hjá monnum er Neistin heilt væl við í oddinum, har StÍF mest sum hevur tryggjað sær finalusess.

Har verður tað StÍF, sum verður mótstøðuliðið, um Neistin kemur somikið langt, og tí er talan helst um styrkisroynd sunnudagin, tá júst tey bæði liðini hittast. Og samstundis er talan um ein dyst, har strandingarnir skulu prógva, at teir hóast finalutapið í steypakappingini, enn makta at vera á tindinum.

Kyndil hevur enn møguleika at vinna Neistan aftur. Men tað krevur so fyrst og fremst, at teir grønu gera sítt. Móti botnliðnum, KÍF, skuldi hetta ikki verið heilt ógjørligt, men nú bæði Høgni Klein og Josef Abrahamsen eru farnir av landinum, er talan um eitt skert Kyndilslið.

Seinasti dysturin hjá monnum verður í Hoyvík, har VÍF vitjar.



*StÍF hevur mest sum tryggjað sær finalusess um FM-heitið, og sunnudagin verður av sonnum ein styrkisroynd hjá bláa havnaliðnum*

## FAKTA

**Dystir um vikuskiftið**

**Hondbóltur**
**Sunset-kappingin**

| Dagur | Kl. | Dystur |
|---|---|---|
| 17.02 | 14.30 | Neistin-StÍF |
| 17.02 | 15.00 | VB-Kyndil |
| 17.02 | 15.00 | Stjørnan-VÍF |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 17.02 | 16.00 | Neistin-StÍF |
| 17.02 | 16.00 | KÍF-Kyndil |
| 17.02 | 16.00 | H71-VÍF |

**Flogbóltur**
**Steypafinalur**

Kvinnur
16.02 13.30 SÍ-ÍF

Menn
16.02 SÍ Mjølnir
(byrjar stutt eftir kvinnufinaluna)

## Gerandisdagur hjá Kyndli

Hjá kvinnunum eru somuleiðis tríggjar uppgerðir á skránni. Neistin tekur á heimavølli móti StÍF, og hetta er eitt høvi hjá teimum bláu at lyfta høvdið eftir niðurtúrin, sum tær hava havt.

VB hevur gagnnýtt tann niðurtúrin til mest sum at staðfesta sítt finalupláss. Sunundagin taka tær ímóti Kyndli, sum var í steypafinaluni, og tann dysturin er helst eitt fint formbarometur hjá VB.

Seinasti dysturin er í Klaksvík, har toppur og botnur hittast í einum dysti, sum Stjørnan helst fyrst og fremst skal brúka til at fáa armarnar niður aftur eftir steypasigurin seinasta vikuskiftið.



*1. Dómari til báðar steypafinalurnar í flogbólti er ásettur, og verður tað, eins og undanfarin ár, Jan Hentze úr Havn. Hann er skrásettur sum altjóða dómari, og við sær í høllina á Hálsi, hevur hann Tummas Óla Mortensen, ið eisini hevur verið við til allar finalurnar*

Steypafinalurnar í flogbólti, sum verða leiktar í høllini á Hálsi í Havn, byrja í morgin kl. 13,30, við kvinnufinaluni millum SÍ og ÍF, meðan menninir hjá Mjølni og SÍ spæla sína finalu umleið kl. 15,00, ella beint eftir kvinnufinaluna.

Dómararnir til dystirnar eru nú ásettir. 1. dómari til báðar dystirnar verður altjóða dómarin Jan Hentze úr Havn, meðan Tummas Óli Mortensen verður 2. dómari.

***Vinarligast***

**Flogbóltssamband Føroya**

**Hondbóltur**

SUNSET KAPPINGIN – KVINNUR

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 14 | 12 | - | 1 | - | 1 | 413 | 308 | 105 | 25 |
| 2 VB | 13 | 8 | - | 2 | - | 3 | 307 | 267 | 40 | 18 |
| 3 Neistin | 13 | 7 | - | 0 | - | 6 | 316 | 309 | 7 | 14 |
| 4 Kyndil | 14 | 5 | - | 1 | - | 8 | 319 | 359 | -40 | 11 |
| 5 StÍF | 14 | 4 | - | 1 | - | 9 | 317 | 358 | -41 | 9 |
| 6 VÍF | 14 | 2 | - | 1 | - | 11 | 294 | 365 | -71 | 5 |

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN – MENN

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 StÍF | 14 | 11 | - | 1 | - | 2 | 407 | 330 | 77 | 23 |
| 2 Neistin | 14 | 9 | - | 1 | - | 4 | 404 | 377 | 27 | 19 |
| 3 Kyndil | 14 | 7 | - | 0 | - | 7 | 367 | 386 | -19 | 14 |
| 4 VÍF | 14 | 6 | - | 1 | - | 7 | 383 | 400 | -17 | 13 |
| 5 H71 | 13 | 6 | - | 0 | - | 7 | 355 | 356 | -1 | 12 |
| 6 KÍF | 14 | 1 | - | 1 | - | 12 | 338 | 405 | -67 | 3 |